# Ridlar undir Hans Tausen Olsen



*Leivur Hansen á veg á stýrisfund í SEV seinasta fríggjadag. Tá bendi nógv á, at stýrisnevndarformaðurin bleiv koyrdur frá, og at Klæmint Weihe fekk uppsagnarskriv.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Stríðið í SEV tykist nú enda við, at stýrið verður valt av nýggjum, og eisini er sannlíkt, at umboðsnevndarformaðurin, Hans Tausen Olsen, verður koyrdur frá. Leivur Hansen kemur ivaleyst at halda fram sum stýrisformaður**

SEV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í farnu viku bendi alt á, at innanhýsis stríðið í SEV fór at enda við, at Klæmint Weihe fór at verða koyrdur frá sum stjóri, og at Leivur Hansen misti sessin sum stýrisformaður. Men nú hevur stríðið tikið eina aðra gongd.

### Hava tryggjað sær neyðugu undirskriftirnar

Leivur Hansen, stýrisformaður, sigur, at minnilutin í SEV-stýrinum - tað eru umframt Leiv sjálvan, Kristian Fríðrik Olsen og Poul Arne Jacobsen, hevur tryggjað sær tær neyðugu 24 undirskriftirnar í umboðsnevndini, sum skulu til fyri at krevja nýval av stýrinum.

– Fyri at krevja nýval av SEV-stýrinum, skal ein triðingur av limunum í umboðsnevndini skriva undir hetta krav. Vit hava í øllum førum tryggjað okkum tær neyðugu 24 undirskriftirnar, og tær fari eg at handa umboðsnevndarformanninum, Hans Tausen Olsen, fríggjadagin, sigur Leivur Hansen, sum enn ikki dugir at siga, um teir hava tryggjað sær avgjørdan meirilut í umboðsnevndini.

### Leivur verður vinnarin

Fríggjadagin var fundur í SEV-stýrinum, og eftir tann fundin handaði minnilutin í stýrinum Hans Tausen Olsen eina áheitan um at kalla inn til eykafund í umboðsnevndini beinanvegin.

Dagsskráin, sum minnilutin vil hava til eykafundin í nevndini, inniheldur millum annað viðurskiftini hjá umboðsnevndarformanninum yvir fyri stýrinum. Somuleiðis er eitt punkt á dagsskránni, ið snýr seg um, hvørt nýggjur umboðsnevndarformaður skal veljast. Tað er eisini sett á dagsskránna, um nýtt stýri skal veljast.

Um Leivur Hansen og hinir í minnilutanum í SEV-stýrinum tryggja sær meirilutan í umboðsnevndini, so er ógvuliga sannlíkt, at Hans Tausen Olsen verður koyrdur frá sum umboðsnevndarformaður. Eisini er tað sannlíkt, at stýrið síðani verður valt av nýggjum, og tá fær Leivur Hansen kanska meirilutan í einum nývaldum stýri.

Á henda hátt kann staðfestast, at Leivur Hansen við taktiskum snildi hevur tryggjað sær formanssessin í SEV-stýrinum, og samstundis sleppur hann av við summar av teimum, ið hann hevur havt mesta stríðið av.

SEV-stýrið fer á fund aftur komandi fríggjadag, og tá verður hildið fram við tí dagsskrá, sum var á fundinum farna fríggjadag. Hetta fundarvirksemi er tó til fánýtis, um so er, at SEV-stýrið verður koyrt frá á næsta umboðsnevndarfundi.

# Tryggar íløgur og skattafyrimunir

**Aftur í dag eru nýggj tilboð at heinta hjá íløguhugaðum føroyingum.**

Sparikassin hevur í tíðindaskrivi boða frá, at tey nú kunnu bjóða føroyingum at keypa part í danska KapitalPleje A/S.

Í tíðindaskrivi verður sagt, at saman við Føroya Sparikassa standa 17 danskir peningastovnar aftan fyri KapitalPleje A/S, og Sparikassin er einasti peningastovnur í Føroyum, ið hevur partabrøvini í KapitalPleje A/S til sølu.

– Sum lógin er í løtuni, fáa privatpersónar ikki skattligan frádrátt fyri rentur av lánum til íløgur og kunnu heldur ikki mótrokna hesar í møguligum vinningi, hóast vinningurin er skattskyldugur. Hendan trupulleikan sleppa fólk undan, um tey keypa partabrøv í Kapitalpleje A/S, tí tað er felagið, sum tekur lán til íløgur, og ikki íleggjarar sum privatpersónar. Avkastið verður skattaða nettoavkastið, eftir at útreiðslur til rentur, umsiting v.m. eru drignar frá í felagnum.

Føroya Banki er samstundis komin við tilboði um tryggar íløgur, soleiðis at teir nú eisini kunnu bjóða somu vøru, sum Kaupthing hevur havt í fleiri ár, og sum Sparikassin eisini kom við í farnu viku.

Hjá Føroya Banka er talan tó um íløgur í japansk virðisbrøv.

– Lánsbrævið er knýtt at japanska TOPIX-vístalinum. Hækkar vísitalið javnt í 5 ára gildistíðini, kastar lánsbrævið upp í 30 prosent í rentu av sær árliga. Tilsamans kann íløgan geva 150 prosent í rentu. Lánsbrævið gevur í minsta lagi 1 prosent í rentu um árið. Vinningur er sostatt tryggjaður við íløguni, verður staðfest í tíðndaskrivinum frá Føroya Banka.

TOPIX-vísitalið er eitt partabrævavísital, ið er sett saman av fleiri enn 1.600 fyritøkum á virðisbrævamarknaðinum í Tokyo. Fyritøkurnar eru í 33 vinnugreinum, og vísitalið umboðar tí væl gongdina í japnaska búskapinum.

**-mørk**



*Við fleiri enn 30 útgávum gjøgnum árini, er Sebastian ein av fólkakærastu troubadurunum í danska tónleikaheiminum*

# Sebastian spælir í Føroyum

**Ein av bestu donsku troubadurunum Sebastian kemur í mars til Føroyar at spæla konsert í Norðurlandahúsinum. Á pallinum verður bara Sebastian, ein mikrofon, ein gittari og ein lagaskattur, sum er vorðin ein stórur partur av sjálvari donsku fólkasálini**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eftir at Sebastian í 10 ár ikki hevði verið á palli sum einstaklingur, fór hann í 2003 aftur á eina konsertferð, ið gjørdist ein brakandi success. Tá konsertferðin almnet var av, var eftirspurningurin enn større enn áðrenn hon byrjaði, tí hevur hann higartil spælt 42 útseldar konsertir sum einstaklingur. Nú kemur konsertferðin til Føroyar. Allastaðni hann hevur spælt, eru áhoyrarar streymaðir til fyri uppliva kanska tann besta trubadurin, ið danir nakrantíð hava havt. Hann er einsamallur maður á pallinum við gittara og sangum, ið hann hevur skrivað seinastu 30 árini. Konsertin í Odense varð tikin upp og er at fáa á fløgu og DVD.

### Lagaskattur

Seinastu 30 árini hevur Sebastian givið út fleiri enn 30 útgávur, so lagaskatturin er stórur, millum nútímans klassikararnar eru løg sum Når lyset bryder frem, Rose, Vårvise, Du er ikke alene, Romeo, Måske ku' vi, Sangen om Langfart, Sørøver Jenny, Ostesangen, Sommerfuglen og Den lille malkeko, Hodja fra Pjotr og sjálvandi tónleikurin úr Ronju Ránsmannadóttir. Sebastian var í Føroyum í sambandi við bæði venjingarnar og framførsluna av Ronju í Norðurlandahúsinum.

### Nógv mentur

Ummælini av konsertferðini vóru sera góð. Ummælararnir hildu hann vera búnaðan nógv av tí langa steðginumHann var mentur undirhaldari á sín egna serstaka hátt við sjálvironi og eini rúgvu av hita. Lens Kryger í Fyns Stiftidende skrivaði t.d. um evnini hjá Sebastian at fáast við kenslur: „ Strofer, der genkalder lyde, dufte og følelser og konfronterer én med minder, man troede længst var glemt ... Det kræver en poet af en ganske særlig kaliber at turde være romantisk, skrøbelig, ja næsten pinagtig inderlig - vel at mærke uden at det bliver tærkrummende. Og sådan en poet er Sebastian - måske den bedste vi har.".

### Nógv virdur

Sebastian starvast annars í gerandisdegnum innan danska sjónleikaheimin. Hann arbeiðir nú við at skriva ikki minni enn tveir nýggjar sangleikir, ið væntandi hava frumframførslu komandi ár.

Hann eigur ein stóran leiklut í nýggjari danskari mentanarsøgu, og hetta er hann eisini heiðraður fyri. Hann fekk í mars 2003 "Danish Folk Award" í Tønder, og nakrar mánaðir seinni i juni fekk hann heiðursprísin frá Skagen Festival fyri sítt "unikke bidrag til den danske sang" og í 2004 fekk hann heiðursprísin frá IFPI til árliga Danish Music Awards 2004.

Atgongumerkini eru enn ikki sett til sølu, men lýst verður við hesum í Kringvarpinum og á heimasíðuni hjá Norðurlandahúsinum, verður sagt úr Norðurlandahúsinum.